## Kæruvegleiðing

Senda vit tær eina skrivliga avgerð, sum ikki til fulnar gongur tær á møti, og sum kann kærast til annan fyrisitingarmyndugleika, skulu vit lata tær eina kæruvegleiðing.

Ein og hvør, sum hevur persónligan og veruligan áhuga í málinum, kann kæra avgerðir, sum eru tiknar við heimild í býarskipanarlógini, byggilógini v.m.

Føroya Kærustovnur viðger kærur um lendismál. Málsøki er breitt og fevnir um avgerðir í sambandi við m.a. bygging, matrikulering, sundurbýti og tinglýsing. Borgarar, fyritøkur og møguliga myndugleikar, ið t.d. hava fingið avgerð frá eini kommunu í samband við eitt byggimál ella frá Umhvørvisstovuni í samband við eitt mál um tinglýsing, kunnu kæra hesar avgerðir til Føroya Kærustovn.

Í lendismálum viðger Føroya Kærustovnur kærur um:

- Avgerðir hjá kommunum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir tinglýsingarlógini og lóg um matrikulering og sundurbýti
- Avgerðir hjá kommununum eftir 1881-lógini um ognartøku
- Avgerðir eftir lóg um eigaraíbúðir
- Avgerðir eftir lóg um bygging

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Kærur til Føroya Kærustovn skulu sendast til:

Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka
Postboks 45
110 Tórshavn

ella við telduposti til: fks@fks.fo